Sosialurin

# VARPIÐ

FRÍGGJADAGUR 20. januar 2006



**Musikkprogrammið - Rufus Wainwright & Antonysa New York**

DR2

Teir gera sangir, ið fáa tárini at trilla. Teir lata seg í sum sokallaðir homo-jesuspersónar og lata seg krossfesta á palli. Ein av teimum mest egnu og dekadentu tónleikapallunum tónar fram í New York, í umhørvinum hjá teimum samkyndu umkring Rufus Wainwright og Antony and The Johnsons. Musikkprogrammið er farið til New York.

**Fríggjadag 20. kl. 22.00**





**Aqua: Turn Back Time**

svf

Tómas Gislason hevur gjørt film um danska poppbólkin AQUA. Við sanginum "Barbie Girl" seldi Aqua fleiri plátur enn U2, Celine Dionne og Madonna til samans, men so brast bløðran og tey fóru hvør sína leið. Tey hava ongatíð tosað um brestin. So tað er ikki sørt bragd, at tað hevur eydnast Gislason at fáa tey saman aftur.

**Mánadag 23. kl. 21.25**

**Olsen-banden går amok**

DR1

Egon kemur úr fongslinum, men Keld og Benny bíða ikki eftir honum við portrið, sum teir plaga. Teir eru nevniliga til arbeiðis í føstum starvi í einum handli. Men sjálvandi hevur Egon eina ætlan ella eina plan. Og hon snýr seg um seks milliónir, ið liggja goymdar í einum húsi á Christianshavn. Skemtifilmur frá 1973 við Ove Sprogøe, Morten Grunwald og Poul Bundgaard.

**Leygardag 21. kl. 19.00**

TV Televarpið

Fleiri rásir - einki roks

**Filmir í hópatali • Barnasendingar • Dokumentar • Náttúra • Tíðindi alt samdøgrið**